Fylgiskjal 9

MEGD

MEGD
Faroe Islands` Union for the Handicapped

Løgmansskrivstovan
N. Festirstein
Tinganes
100 Tórshavn

Tórshavn 22.05.2019

J. nr.
Viðgjørt J. Christiansen
Tykkara j.nr. 0697-008/18

**Hoyringsskriv viðvíkjandi lógaruppskoti til Ríkislógartilmæli um at seta í gildi fyri Føroyar Anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om politiets virksomhed.**

MEGD tekur undir við, at lógin um politiets virksomhed (politiloven) verður sett í gildi fyri Føroyar. Tað hevur týdning, at rættartrygdin hjá borgarunum verður styrkt, og at politiið fær greitt grundarlag at arbeiða út frá í støðum, har politiið fyri at kunna røkja sínar uppgávur, má fremja inntriv mótvegis borgarum.
Eins og tað hevur týdning, at skynsamt verður farið fram við at taka sær av „veikum og sárbærum persónsbólkum, sum ikki eru før fyri at ansa sær sjálvum, og sum verða hitt undir slíkum umstøðum, at tey eru í vanda fyri seg sjálvi og onnur."

MEGD vil vísa á týdningin, at borgarar, ið hava avbjóðingar á ein hvønn hátt, fáa hóskandi viðferð og at viðkomandi fakfólk verða boðsend, so tey í tilgongdini verða sædd, hoyrd og vird.

Vísandi til grein **12 í ST-sáttmálanum** um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek ***Eins fyri lógini:***
1. Limalondini vátta uppaftur, at fólk, ið bera brek, hava rætt til alla staðni at fáa sítt rættarføri viðurkent.
2. Limalondini ásanna, at fólk, ið bera brek, eiga rættarføri á jøvnum føti við onnur í øllum lívsins viðurskiftum.
3. Limalondini skulu taka hóskandi stig at útvega fólkum, ið bera brek, atgongd til tann stuðul, tey kunnu hava tørv á til tess at nýta sítt rættarføri.
4. Limalondini skulu tryggja, at øll stig, sum viðvíkja tí at útinna rættarføri, fata um hóskandi og munagóð verjutiltøk til at fyribyrgja misnýtslu sambært altjóða mannarættindalóg. Slík stig skulu tryggja, at atgerðir viðvíkjandi at útinna rættarføri, virða rættindi, vilja og áhugamál hjá fólkinum, ikki hava egináhugamál og óhóskiliga ávirkan, standa mát við og eru lagað eftir umstøðunum hjá einstaklinginum, krevja stytst møguliga tíð og verða javnan endurskoðaðar av skikkaðum, uttanveltaðum og óheftum myndugleika ella dómsvaldi. Verjutiltøkini skulu standa mát við ta ávirkan, sum slík stig hava á rættindi og áhugamál hjá einstaklingi.

Eisini vil MEGD vísa á grein **13 *Atgongd til rættarskipanina***:
Stk 1. Limalondini skulu tryggja, at um so er, at fólk, ið bera brek, verða frælsisskerd av einihvørjari orsøk, skulu tey á jøvnum føti við onnur hava rætt til trygd í samsvari við altjóða mannarættindi og skulu verða viðfarin í samsvari við endamál og meginreglur í hesum sáttmála.
Stk 2: Til tess at tryggja fólki, ið bera brek, at tey fáa brúkt rættarskipanina, skulu limalondini virka fyri, at tey, sum arbeiða í rættarfyrisitingini, harímillum løgregla og fongsulsstarvsfólk, fáa hóskandi uppvenjing í tí.

Og grein **14 *Frælsi og trygd hins einstaka***, at fólk, ið bera brek, á jøvnum føti við onnur:
Stk 1, b) verða ikki fongslað ólógliga og tilvildarliga, og at øll frælsisskerjing skal vera í samsvari við lógina, og at brek má í ongum føri rættvísgera frælsisskerjing.

MEGD
Faroe Islands` Union for the Handicapped

Eins og grein 17 ***Verja sjálvræðisrætt (integritet) hins einstaka***, at ein og hvør, ið ber brek, hevur rætt til virðing fyri sínum likamliga og sálarliga sjálvræðisrætti (integritet) á jøvnum føti við onnur.

Kelda MEGD: https://megd.fo/st-sattmalin

Vinaliga fyri MEGD

Jónvør Christiansen, aðalskrivari

Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
The Faroe Islands

Tel: +298 317373
Týsdag, mikudag og hósdag kl. 10 – 15
megd@megd.fo